Sosialurin





*13 ár skuldu ganga, frá tí tey sóu hvørt annað fyrstu ferð, til Mamy Dahl Sørensen og Hákun Egilsnes skuldu giftast. – Hetta verður ein spennandi og minnisríkur dagur, siga tey bæði við ein munn*

**Hon um hann**
*Hákun, hann er:*
- fittur
- erligur
- til at stóla uppá
- roynir altíð at gera hinum til pass
- ordnar øll pappír

**Hann um hana**
*Mamy, hon er:*
- fitt
- erlig
- er altíð glað, og ongantíð morgunljót
- sera virkin
- nógvar ætlanir
- rólig typa
- einki vas
- vit passa saman – tað sum eg tími minst, tað dugir hann

# Hon skrivaði seg inn í hjartað

**Leygardagin verður aldarinnar vígsla á Viðareiði og aldarinnar brúdleyp í Vestmanna. Hetta hendir, tá Mamy Dahl Sørensen og Hákun Egilsnes ganga saman í hjúnalag. – Hvør skuldi trúð at so nógv verður gjørt burtur úr, og at tað skuldu koma 700 gestir í okkara brúdleyp, sigur brúðgómurin sum er ættaður úr Vestmanna**

BRÚDLEYP
*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Viðareiði/Vestmanna:** - Jú, tað er nógv at fyrireika til eitt so stórt brúdleyp. Men vit hava fingið sera góða hjálp.

- Tað eru helst somu fyrireikingar til eitt brúdleyp við 200 fólkum sum til tað hjá okkum. Tað skal sjálvandi meiri tilfar til, men fyrireikingarnar eru helst ikki so nógv øðrvísi, sigur tann komandi brúðurin.

Tað var longu í juli mánaði at tíðindini bórust um, at 44 ára gamla Mamy Dahl Sørensen av Viðareiði og 46 ára gamli Hákun Egilsnes skuldu giftast leygardagin 6. september 2008 við eitt vælkomstbrúdleyp í bygdarhúsinum í Leirvík.

Tað tók ikki langa tíð fyrrenn fólk byrjaðu at tekna seg til brúdleypið. Og ta einu løtuna vóru 710 fólk á listanum. Onkur hevur kortini tikið seg av aftur, men tað tekur einki frá tí, at talan verður um størsta brúdleypið nakrantíð, tá teir 670 gestirnir úr øllum landinum seta seg til borðs leygardagin í ítróttarhøllini í Vestmanna.

- Vit eru sera, sera, sera spent uppá dagin, sigur høgt-upp-um-oyruni-forelskaða-parið sum hittust fyrstu ferð fyri 13 árum síðani.

Nógv er at fyrireika til ein slíkan dag, men tey hava kortini tíð til eitt prát um brúdleypið og fyrireikingarnar við Sosialin.

- Ja, kemur tað brosandi frá Hákuni. – Hugsa tær til, at eg verði 96 og tú 94 ár, tá vit bæði hava gullbrúdleyp!

Brúðurin má so smátt eisini byrja at venja seg við eitt lív sum sjómanskona. Longu 2. oktober fer Hákun aftur til skips.

## Fullan bil við køkum

Tað er rættiliga ófýsið á Viðareiði fyrrapartin í gjár. Men inni í stovuni hjá Mamy er bæði heitt og lýtt.

Við eitt køksborð sita Hákun, vermóðir hansara Gudrid og Laura, ein bygdarkona. Mamy sjálv stákast við at gera ein drekkamunn kláran.

- Eg veit ikki rættiliga. Eg dugi ikki so væl at slappa av. Men fríggjadagin ætli eg mær einki at gera. Hesin dagur skal verða mín frídagur.

- Eg ætli mær at spæla Gekk – og vinna hann!, sigur hon avgjørd.

Hini við borðið brosa afturímóti hesi kvinnuni, sum fer at standa brúður leygardagin í heimkirkju sínari á Viðareiði. Hetta verður dagur í viku fyri brúðarparið og eisini fyri teir útivið 700 gestirnar, sum verða við til veitsluna í Vestmanna seinni um kvøldið.

Tað er skjótt at kaffikannan er komin á borðið, saman við fýra sløgum av nýbakaðum smákøkum.

- Eg havi fleiri sløg at bjóða tær, men kanska tú noyðist við hesi. Annars kundi eg lættliga lopið út í bilin eftir fýra sløgum aftrat. Hann stendur í túninum, fult lessaður við smákøkum og øðrum sum skal til brúdleypið, sigur Mamy.

Allar tær túsundtals køkurnar, ið krevjast til aldarinnar brúdleyp, eru komnar frá familju og góðum vinfólki. Mamy og Hákun hava ferð eftir ferð sannað hesar seinastu dagarnar, at tá ein hevur brúk fyri familju og góðum vinum at hjálpa til, ja so eru tey har.

- Smakka nú endiliga hesar vaniljukransarnar. Teir hevur mamma bakað. Eg veit ikki, hóast mamma er farin um tey 75, so dugir hon líkasum ikki at lata vera at hjálpa til, nú eg, - .... eg meini, VIT skulu giftast, sigur hon og brosar yvir ímóti Hákuni.

## Avgerandi samtala í 1995

Eins og hjá øllum øðrum hjúnum er altíð áhugavert at vita, hvussu tey funnu hvørt annað. Eingi pør eru eins og eingin forsøga heldur.

- Ahnoy, behøvist tú at spyrja um tað? Er tað nakað at skriva um í Sosialinum?, spyr Mamy.

- Ja, man nakar tíma at lesa um okkum bæði?, sigur Hákun.

Hóast tann komandi brúðgómurin tykist eitt sindur meiri afturhildin enn komandi hjúnafelagi sín, er hann beinanvegin við uppá at lýsa henda spurningin.

- Jú, sært tú. Vit skulu faktiskt 13 ár aftur í tíðina. Heilt aftur til 1995, byrjar hann frásøgn sína um hesa minniligu løtuna.

Lítið grunaði nakar teirra tá, at tey skuldu ganga inn í hjúnalag nú leygardagin. Hetta fór fram inni hjá einum systkinabarni hennara, sum búði í Havn.

> *Kortanei. Eg vil fegin giftast, men tað skal í øllum førum ikki verða ein fríggjadag*

Tað sjáldsama var, at Hákun var eisini komin á gátt hetta sama kvøldið. Hóast løtan var stutt, og onnur fólk vóru til staðar, so fingu tey kortini prátað saman eina løtu um mangt og hvat.

- Eg minnist hvørt orð frá samtaluni. Hon vardi kans-

> *Eg bleiv bæði spentur og ørkymlaður í einum: Her stóð hon og tosaði við ein annan mann. Eg sansaði ikki hvør hann var, ella hvussu hann sá út ella hvussu gamal hann var. Og eg tordi heldur ikki at steðga bilinum, men koyrdi bara víðari*